LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 15. februar 2022
J.Nr.: LUM-00- 22/00137-25
(at tilskila í svari)

# Álit

viðvíkjandi klagu um sýtan av innliti í skjal við talupunktum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum

Við skrivi, dagfest 4. januar 2022, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Undirritaði hevur biðið um innlit í ávís skjøl í Fiskimálaráðnum, upprit v.m. sum eru tengd at einum ávísum máli, sum er vorðið viðgjørt í Fiskimálaráðnum.
>
> Ráðið vil ikki geva innlit og grundgevur fyri sínari avgerð. Ráðið vísir í høvuðsheitum til, at talan er um innanhýsis skjøl.
>
> Uttan at fara inn á innlitslógina sum so, so dugir undirritaði ikki at skilja, hví innlit ella partvíst innlit ikki skuldi verið latið í innanhýsis skjøl í einum máli, sum eru meira enn 10 ára gamalt.
>
> Atlit, sum tala fyri ikki at geva innlit í innanhýsis skjøl snúgva seg um at geva fyrisitingini umstøður at fyrireika mál, uttan at arbeiðsgongdin verður nervað av almennum áhuga, áðrenn mál byrja at taka sín endaliga form.

> Eg vildi hildið, at hesi atlit eru óviðkomandi, tá málið er 10 ára gamalt, og at Fiskimálaráðið tí átti at givið innlit eftir reglunum um meirinnlit."

**Málsgongd**

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 4. januar 2022, varð klagan send Fiskimálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Fiskimálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum avrit av skjalinum, sum innlit var sýtt í, umframt skjalayvirlit í málinum.

Tann 17. januar 2022 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum avrit av umbidna skjalinum við talupunktum hjá landsstýrismanninum umframt skjalayvirlit í málinum.

Tann 20. januar 2022 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Málið snýr seg um innlit í eitt skjal við talupunktum hjá landsstýrismanninum.
>
> Skjalið er bert gjørt til egna nýtslu í sambandi við eitt samráð í Vinnunevndini og skjalið hevur ikki verið latið øðrum. Skjalið er tí eitt innanhýsis arbeiðsskjal sambært § 7, stk. 1, nr. 1 í lógini um innlit í fyrisitingina.
>
> Skjalið inniheldur møgulig svar til spurningar frá Vinnunevndini. Ráðið metir ikki, at talan er um upplýsingar, sum innlit skal latast í sambært § 8 í lógini um innlit í fyrisitingina. Skjalið inniheldur heldur ikki veruligar upplýsingar av stórum týdningi fyri málið, og Ráðið hevur tí heldur ikki latið innlit sambært § 11, stk. 1.
>
> Viðvíkjandi at lata meirinnlit sambært § 4, stk. 1, 2. pkt. hevur Ráðið vigað áhugan hjá A at fáa innlit í upplýsingarnar mótvegis fyrilitinum til, at fyrisitingin kann arbeiða órógvað. Hóast skjalið møguliga ikki inniheldur upplýsingar, sum vanliga skiljast sum metingar hjá fyrisitingini, metir Ráðið, at fyrilitið til at kunna arbeiða órógvað eisini ger seg galdandi viðvíkjandi talupunktunum. Tað er umráðandi, at landsstýrismenn kunnu gera sær

talupunktir, uttan at vandi er fyri, at onnur seinni fáa innlit í hesi. Ráðið vildi ikki mett, at tann støða, at 10 ár eru farin, sum kærarin vísir á, hevur týdning í hesum sambandi. Talupunktini høvdu heilt víst verið skrivað øðrvísi, um almenningurin skuldi síggja tey.

Harafturat er óvist í hvønn mun landsstýrismaðurin hevur brúkt talupunktini, tá hann hevur svarað spurningunum. Tað kann tí vera óheppið, um tey nú vera útleverað og framstanda sum tað, hann hevur svarað.

Um landsstýrismaðurin ynskti, at innlit skuldi vera í hansara talupunktir, hevði hann kunna avleverað tey til Vinnunevndina í sambandi við samráðið, og tey høvdu verið almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Løgtinginum, um tey ikki vóru latin í trúnaði."

Við skrivi, dagfest 21. januar 2022, vórðu viðmerkingarnar hjá Fiskimálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 30. januar 2022 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"Í 2010 ásettu Føroyar sær egna kvotu av makreli. *Nýggj føroysk makrelkvota* var ein trífaldan av *søguligu* føroysku kvotuni.

Nýggja kvotan varð útlutað, t.e. *konverterað til brúksrættindi hjá persónum og feløgum*.

Vinnunevndin ynskti innlit í fyrisitanina av nýggju kvotuni, m.a.:

- *Eftir hvørjari fyriskipan ella kunngerð útlutanin fór fram?* og annars
- *Hvussu ráðið í sambandi við útlutanina hevði tryggjað seg mót kappingaravlagan í fiskivinnuni, og hvussu útlutan varð ætlað at fara fram framyvir.*

*Løgtingið samtykkir lógir, og landsstýrið fyrisitur við heimild í lóg og í samsvari við lóg. Lógin er bindiliðið millum Løgtingssins vilja og ta rættarstøðu, sum borgarin hevur/fær.*

Lógin um vinnuligan fiskiskap var galdandi á fiskivinnuøkinum í 2010. Endamálið við lógini var at skipa gagnnýtslu av tøkum livandi fiskatilfeingi, sum var fevnt av lógini (§ 1.)

Tøka livandi fiskatilfeingið var sambært lógini ein rávøra, sum var ogn hjá føroysku tjóðini (§ 2). Rættindi í lógini vórðu latin sum brúksrættindi (§ 3).

> Innlitsumbønin snýr seg ikki um prosessina – tilgongd og mannagongdir fyri útlutan – men um løgliga grundarlagið (rættarreglur, siðvenjur, meginreglur og atlit), sum útlutanin tók støði í.
>
> Hví og við heimild í hvørjari undantaksreglu skuldi fyrisitingarmyndugleikin havt ein tørv á at nokta borgarum innlit í løgliga grundarlagið, tá ið ráðið fyrisitur rávøru hjá føroysku tjóðini.
>
> Undirritaði er tískil av teirri uppfatan, at tað sum Fiskimálaráðið førir fram um, hví innlit ikki skal veitast, er óviðkomandi við atliti at tí, sum innlit verður biðið um."

Við skrivi, dagfest 31. januar 2022, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Fiskimálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 1. februar 2022 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Vísandi til viðmerkingar kærarans í skrivi til Løgtingsins Umboðsmann, dagfest 30. januar, skal Ráðið viðmerkja, at kærarin her tykist at nágreina/víðka sína innlitsumbøn, og eru hansara viðmerkingar tí ikki beinleiðis viðkomandi fyri ta viðgerð, sum Ráðið hevur framt í hesum máli.
>
> Kærarin hevur biðið Ráðið um innlit í skjøl, upprit vm., sum eru tengd at tí í umbønini nevnda samráði, og Ráðið hevur tí viðgjørt tey skjøl, sum eru tengd at hesum samráði.
>
> Tað viðkomandi skjalið hesum viðvíkjandi er skjalið við talupunktum landsstýrismansins til samráðið.
>
> Ráðið metir, at málið er viðgjørt nøktandi vísandi til orðingina av innlitsumbønini, og Ráðið hevur ikki fleiri viðmerkingar til viðgerðina av hesum skjali.
>
> ..."

Tann 2. februar 2022 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum. Samstundis vórðu viðmerkingarnar frá Fiskimálaráðnum, dagfestar 1. februar 2022, sendar klagaranum til kunningar.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um sýtan av innliti í eitt skjal við talupunktum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Sambært upplýsingunum frá Fiskimálaráðnum varð skjalið gjørt til egna nýtslu, og landsstýrismaðurin hevði tað við sær til eitt samráð í Vinnunevndini í Løgtinginum. Skjalið varð ikki latið øðrum.

Eg eri samd við Fiskimálaráðið í, at talan er um eitt innanhýsis skjal sambært § 7 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001), og at skjalið tí er undantikið innliti. Eg haldi heldur ikki, at skjalið er fevnt av § 8 í innlitslógini, sum veitir innlit í ávís innanhýsis skjøl.

Sambært § 11, stk. 1 í innlitslógini skal innlit tó latast, í samsvari við vanligu reglurnar í innlitslógini, í upplýsingar í m.a. innanhýsis skjølum um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, sokallað ekstrahering.

Fiskimálaráðið upplýsir í frágreiðing síni, dagfest 20. januar 2022, at skjalið ikki inniheldur veruligar upplýsingar av stórum týdningi fyri málið, og at ráðið tí heldur ikki hevur latið innlit í upplýsingar í skjalinum eftir § 11, stk. 1 í innlitslógini. Ráðið hevur eisini umhugsað meirinnlit eftir § 4, stk. 1 í innlitslógini, og hevur í hesum sambandi vigað áhugan hjá klagaranum at fáa innlit í upplýsingarnar mótvegis fyrilitinum fyri, at fyrisitingin kann arbeiða í frið. Ráðið metir tað ikki hava týdning fyri at lata innlit, at 10 ár eru farin, síðani skjalið varð framleitt. Harumframt førir Fiskimálaráðið fram, at tað er óvist í hvønn mun landsstýrismaðurin brúkti talupunktini, tá hann svaraði spurningunum í samráðnum í Vinnunevndini.

Eg skal vísa á, at skyldan til at lata innlit í veruligar upplýsingar eftir § 11, stk. 1 í innlitslógini ikki bara fevnir um veruligar faktuellar upplýsingar, men eisini um sokallað “funktiónsfakta”. Hetta eru upplýsingar, sum eru er við til at styðja próvliga grundarlagið í málinum ella annars

hava til endamáls at skapa greidleika viðvíkjandi veruligu umstøðunum í málinum. Her kann vera talan um upplýsingar, sum hava ein meira subjektivan dám (sí “Betænkning om offentlighedsloven 1510/2009”, s. 557, sum vísir til viðmerkingarnar til gomlu donsku innlitslógina, sum svarar til galdandi føroysku innlitslógina). Spurningurin um, hvørt talan er um eina upplýsing um veruligar umstøður, er tí ikki bara ein spurningur um innihaldið av upplýsingini, men eisini um, hvørja funktión upplýsingin hevur í ítøkiliga málinum.

Tað ber ikki til at gera eina almenna lýsing av, hvat liggur í kravinum um, at upplýsingin skal hava stóran týdning fyri málið. At ein upplýsing er skrivað í eitt skjal í einum máli merkir ikki neyðturviliga, at upplýsingin er av stórum týdningi fyri málið. Tað kann hugsast, at upplýsingin var av stórum týdningi fyri málið, tá hon varð skrivað, men at hon við tíðini hevur mist týdningin. Vavið av skylduni at ekstrahera kann tí vera treytað av, nær innlit verður biðið í málið.

Eg skal viðmerkja, at í sambandi við metingina av skylduni at lata innlit í upplýsingar í ítøkiliga skjalinum, er eftir mínum tykki ikki avgerandi, í hvønn mun landsstýrismaðurin brúkti talupunktini í skjalinum undir samráðnum í Vinnunevndini. Tað, sum er avgerandi, er eyðkennið á teimum einstøku upplýsingunum, og hvørjum samanhangi tær eru partur av.

Eg havi lisið innanhýsis skjalið við talupunktunum hjá landsstýrismanninum. Eg haldi, at stórur partur av skjalinum eru sjónarmið, metingar, argument og politisk og strategisk úttalilsir, sum tað eftir míni fatan ikki er skylda at ekstrahera eftir § 11, stk. 1 í innlitslógini. Eg haldi tó, at nøkur av talupunktunum eftir umstøðunum kunnu metast at innihalda veruligar upplýsingar, tí upplýsingarnar síggja út til at greiða frá um tilburðir, sum eru farnir fram, tiltøk, sum landsstýrismaðurin hevur framt, og tiltøk, sum landsstýrismaðurin hevur avgjørt at gjøgnumføra. Eg haldi eisini, at nøkur av punktunum innihalda sokallað “funktiónsfakta”, sum skapa greidleika viðvíkjandi veruligu umstøðunum í málinum. Hervið havi eg ikki tikið støðu til, um upplýsingarnar eru av stórum týdningi fyri málið, ella um upplýsingarnar, í tann mun skylda er at ekstrahera tær, kunnu undantakast eftir øðrum ásetingum í innlitslógini.

Í sambandi við metingina av, um meirinnlit skal latast í eitt innanhýsis skjal, eri eg samd við Fiskimálaráðið í, at atlit kann takast at arbeiðsfriðinum hjá fyrisitingini, soleiðis at fyrisitingin

trygt kann meta um og gera fyrireikandi arbeiði í einum máli á ein frían og formleysan hátt uttan tað trýst, sum ein møgulig seinni almannakunngering av metingini kann verða.

Hinvegin eigur fyrisitingin at hava í huga, at endamálið við almennum innliti er at tryggja gjøgnumskygni í fyrisitingini, soleiðis at borgarar og miðlar í mest møguligan mun kunnu fylgja við og hava eftirlit við, at alt fer rætt fram, tá fyrisitingin útinnir arbeiði sítt, og soleiðis at borgarar kunnu kjakast og taka støðu til almenn viðurskifti, til frama fyri fólkastýrið. Tað, at almenningurin verður kunnaður rætt og gjølla um virksemið í fyrisitingini, kann vera gagnligt fyri álitið á fyrisitingina. Hesi atlit eiga at verða vigað upp móti atlitinum at fyrisitingin skal kunna arbeiða í frið, tá mett verður um, hvørt meirinnlit skal latast í eitt innanhýsis skjal.

Eg skal vísa á, at á heysti 2021 varð áheitan frá 15 tingfólkum latin løgtingsformanninum um at seta ein kanningarstjóra at kanna lógargrundarlagið, lógar- og reglutulkingar og fyrisitingarligar avgerðir í føroyskari fiskvinnufyrisiting viðvíkjandi tilluting av og útluting av fiskirættindum síðani 2010. Kanningarstjóri verður væntandi settur skjótt. Umhugsast má tí, um skjalið við talupunktunum hjá landsstýrismanninum eftir umstøðunum er fevnt av § 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini og tí er undantikið innliti í síni heild. Treytin fyri hesum er, at skjalið má væntast at verða partur av komandi kanning, og at innlit í upplýsingar í skjalinum kunnu hugsast at skaða arbeiðið hjá kanningarstjóranum. Hetta haldi eg, at ein komandi kanningarstjóri kundi mett um.

Burtursæð frá omanfyristandandi viðmerkingunum geri eg ikki meira við málið.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður